Álit

í

løgtingsmáli nr. 127/2020: Uppskot til løgtingslóg um ognan av fastogn í Føroyum

Høgni Hoydal, løgtingsmaður, hevur lagt málið fram 5. mars 2021, og eftir 1. viðgerð 9. mars 2021 er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 22. mars 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Betri Heim, Skyn, Áhugafelagið Búgva, Útoyggjafelagið, Kommunufelagið, landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum saman við umboði fyri tinglýsingina á Umhvørvisstovuni og løgmann.

Undir viðgerðini í nevndini er komið fram, at tað helst er ein vaksandi áhugi millum útlendingar at keypa fastogn ogn í Føroyum. Enn er tó ikki talan um nakran stóran trupulleika.

Í løtuni verða seldar umleið 600 fastognir árliga, og talið á ognum, sum verða seldar útlendingum, liggur millum 3 og 10 um árið, møguliga lægri. Meklarafyritøkur upplýsa, at áhugin millum útlendingar at keypa fastogn í Føroyum serliga snýr seg um ognir uttan fyri miðstaðarøkið. Sum oftast er talan um summarhús, har útlendski eigarin býr ein part av árinum í Føroyum.

Tað hevur ikki verið møguligt hjá tinglýsingini á Umhvørvisstovuni at gera hagtøl fyri, hvussu nógvir útlendingar eiga fastogn í Føroyum. Nevndin er tó sannførd um, at talan ikki er um nógvar ognir.

Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum hevur upplýst fyri nevndini, at landbúnaðarlóggávan ikki krevur, at tann, sum tekur við einum festi, skal vera føroyingur. Um viðkomandi annars lýkur treytirnar fyri at taka við einum festi, undir hesum eisini treytina um bústað, er einki, sum forðar fyri, at ein útlendingur tekur við einum festi.

Løgmaður hevur upplýst fyri nevndini, at eitt uppskot, sum regulerar møguleikan hjá útlendingum at ogna sær fastogn í Føroyum, er gjørt. Uppskotið varð sent til hoyringar seinast í mars, og verður eftir ætlan lagt fyri Løgtingið eftir ólavsøku.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Christian Andreasen, Frimodt Rasmussen, Erhard Joensen og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Føroyar eru eitt lítið land, og tí kann tað skjótt fáa munandi samfelagsligar avleiðingar, um útlendingar í stórum tali keypa fastogn í Føroyum. Mangt bendir á, at tað er ein vaksandi áhugi millum útlendingar at keypa fastogn í Føroyum. Tí er tað av stórum týdningi, at Løgtingið skjótast gjørligt samtykkir hóskandi regulering á hesum øki, eins og flestu grannalond okkara hava gjørt.

Vísandi til, at løgmaður hevur gjørt eitt uppskot til løgtingslóg, sum er sent til hoyringar, er meirilutin av teirri áskoðan, at tað ikki er neyðugt at samtykkja hetta uppskotið, tá løgmaður er á veg í tingið við sínum uppskoti.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Sirið Stenberg, Ingilín D. Strøm og Hervør Pálsdóttir) hevur hesar viðmerkingar:

Áhugin fyri at ogna sær bústað ella keypa jørð í Føroyum er vaksandi. Við gongdini á fíggjarmarknaðinum, har bankar krevja negativa rentu, og altjóða grunnar og íløgupersónar keypa bústaðir og jarðarognir í ymsum londum, kann hetta bara vinda uppá seg.

Føroyar eru í teirri støðu, at ríkir einstaklingar ella fyritøkur lættliga kunnu keypa upp heilar bygdir, býlingar, og enntá heilar oyggjar, um ikki verður bundið fyri. Í løtuni er einki yvirhøvur, sum forðar eitt nú einari stórari útlendskari fyritøku ella ríkum einstaklingi at keypa risa økir av jørð ella fyri tann skuld meginpartin av húsunum í lítlari bygd ella oyggj. Hesum má bindast fyri.

Við hesum uppskoti verða grundleggjandi treytirnar settar fyri at eiga fastogn í Føroyum:

- At persónur hevur bústað og hevur verið skattskyldugur í Føroyum í tvey ár.
- Ella, at persónur hevur havt bústað og verið skattskyldugur í Føroyum í tilsamans 5 ár.
- Tað sama verður galdandi fyri aðrar løgfrøðiligar persónar, sum feløg, stovnar, grunnar v.m. og útlendskar myndugleikar.

Hesar reglur tryggja eisini, at fólk, ið eru uttanlands í lestrarørindum ella starvsørindum, kunnu hava síni rættindi í Føroyum. Eisini verður tryggjað, at børn, hjúnafelagar og eftirkomarar v.m. kunnu arva, og at til ber at sita í óskiftum búgvi.

Hjá teimum, ið ikki lúka hesar treytir, verður møguleiki at søkja serligt loyvi, har tvær ella fleiri av hesum treytum skulu lúkast:

- At prógvast kann eitt serligt tilknýti til Føroya.
- At talan ikki er um ogn til tess at vinna pening av landinum, at útvega skattafyrimunir ella tílíkt.
- At bústaðar-og vinnumøguleikar hjá fólkinum í landinum ikki verða skeiklaðir.
- At talan er um almannagagnlig endamál.

Undir nevndarviðgerðini er komið fram, at áhugin hjá útlendingum at keypa fastogn í Føroyum er vaksandi, at Búnaðarstovan hevur fingið fyrispurning um festi í Føroyum, umframt at áhugi hevur verið frá útlendingum at ogna sær stór øki at byggja íbúðir og bústaðir á.

Serliga er áhugin hjá útlendingum at ogna sær bústað uttanfyri meginøkið og at ogna sær serføroysk hús. Í sambandi við onnur bústaðarpolitisk uppskot hevur eisini verið frammi, at tað ofta er trupult hjá fólki á útoyggj at ogna sær bústað á staðnum, tí fíggingarmøguleikarnir eru ikki so góðir. Tí mugu vit eisini virka fyri, at tey fastbúgvandi ikki verða noydd úr síni heimbygd, tí ríkir einstaklingar ella fyritøkur keypa upp ognir at brúka sum summarhús og harvið tøma útoyggjarnar fyri fastbúgvandi. Tað er tí neyðugt bæði at arbeiða við at bøta um fíggingarmøguleikar hjá fastbúgvandi á

småplássunum, eins og tørvur er á greiðum reglum um, hvør kann keypa fastogn í Føroyum. Tí í løtuni eru ongar reglur.

Hóast tað enn ikki er talan um nógv ítøkilig mál um sølur til fólk, sum ikki búgva í Føroyum, so er hetta eitt álvarsmál, tí lendið er avmarkað, og ongar reglur eru um keyp. Somuleiðis er áhugin vaksandi, ferðavinnan er vaksandi, og Føroyar eru sum heild áhugaverdar fyri umheimin. Tí er alneyðugt at fáa skipaði viðurskifti beinanvegin.

Vit kunnu ikki altíð sammeta okkum við stór lond sum Spaniu, Turkaland o.o., ið ofta hava verið tikin fram í kjakinum, tí føroyingar eisini eiga ognir uttanlands. Føroyar eru lítlar, og ein stórur partur av ognunum kann skjótt enda á útlendskum hondum. Vit eru meira viðbrekin enn størri tjóðir, og samanhangsmegin í samfelagnum viknar skjótt, um alsamt fleiri fastognir verða seldar útlendingum, og hús standa tóm næstan alt árið.

Minnilutin heldur tað vera alneyðugt at fáa skipaði viðurskifti á hesum øki skjótast gjørligt.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Rættarnevndin, 16. apríl 2021

Christian Andreasen formaður	Ingilín Didriksen Strøm næstformaður	Frimodt Rasmussen
Erhard Joensen	Steffan Klein Poulsen	Sirið Stenberg
	Hervør Pálsdóttir	